hevur, men sum sjálvt ST hevur.

Hann mælti til at taka djarvar støður í hesum máli og at lond, sum trúgva uppá samhaldsfesti, fólkaræði, tað einstaka menniskja og eitt rættvíst samfelag og hann segði at vit hava skyldu til at standa saman og at føla skyldu mótvegis hvørjum øðrum, heldur enn bert at røkja trongskygd, tjóðskaparlig áhugamál, har tað bara ræður um at verja seg sjálvan.

Hann segði, at ST var stovnurnin, sum átti at taka neyðugu stigini mótvegis Irak, so at hópoyðingarvápnini verða burturbeind, men vil Irak ikki boyggja seg, verður neyðugt at seta tiltøk í verk.

– Hann legði dent á, at hetta var ikki eitt stríð ímillum lond, men eitt stríð fyri at varðveita nøkur virði, sum vit trúgva uppá.

Hvat heilsuverkinum, hevur Labour lagt á annan bógv og vil partvís hava tað privata vinnulívið at fíggja heilsuverkið.

– Hetta hevur møtt harðari mótstøðu,serliga frá fakfeløgunum. Men Tony Blair legði dent á, at talan var ikki um at lata privat áhugamál yvirtaka hugsjónarligu stýringina av heilsuverkinum. Men tað er ein spurningur um at lata borgaran fáa ta bestu tænastuni so at tað, sum virkar væl, skal batna enn meiri. Hetta skal samstundis eggja teimum, sum hava minni góð úrslit at vísa á, til at taka neyðug stig til at bøta um støðuna.

Jóannes Eidesgaard segði, at røðan hjá Tony Blair var víðskygd.

– Tað var týðiligt, at hann hevði gjørt støðuna upp við seg sjálvan og hann var greiður í sínum boðskapi. Hann talaði sum ein stórur og sterkur politikari og fagnaðurin,sum breyt hann av, fleiri ferðir meðan hann talaði og serliga tá ið hann var liðugur, var øguiligur og var týðiligt prógv um, at enski forsætisráðharrin er langt frá einsamallur við sínum boðskapi.

Dagin eftir helt gamli amerikanski forsetin, Bill Clinton, røðu.

– Hann tosaði meiri um heildina og røðan var merkt av, at hetta var ein fyrrverandi politikari, sum tosaðu eftir teimum royndum, hann hevði, men hann undirbygdi dyggiliga røðuna hjá Blair og tosaði um skylduna, vit hava mótvegis hvørjum øðrum og teimum virðum, vit trúgva uppá.

– Í spurninginum um Irak, var hann ikki so avgjørdur, men mælti til, at hetta var eitt mál, sum ST loysti, tí brestur ein bumba, tekur hon altíð ósek við sær, sama, hvussu væl hon er gjørd. Men hann duldi heldur ikki fyri, at tað kunnu uppstanda støður, har tað ikki slepst undan at brúka vápnamegi.

Jóannes Eidesgaard sigur, at talan var um tveir frálíkar røðarar og tveir framúr politikarar, men tað var munur á, at at Tony Blair var tann mest kveikjandi av av teimum og tað kemst helst av, at hann er virkin og tað er Clinton ikki longur.

Formaðurin í føroyska javnaðarflokkinum sigur eitt kvøldið hevði ein friðarfelagsskapur í Bretlandi fund á einum hotelli.

Hetta var ein felagsskapur, sum var ímóti kríggi við Irak og sum var fyri avvápnað. Ein røðari á hesum fundinum var kendi, gamli politikarin, Tony Benn, sum hevur greiðar og avgjørdar hugsjónir.

– Tað var ein ótrúligur røðari, sum bergtók fólk uttan at hava handrit at halda seg til og hann tosaði nogv um trúnna uppá at tað ber til at fáa eitt betri samfelag, uttan vápnamegi.



*Høvi varð eisini hjá Jóannesi Eidesgaard at heilsa upp á enska uttanríkisráðharran, Jack Straw.*
*Tað eru slíkar menn, vit eiga at hava gott samstarv við, skuldu vit í Føroyum fingið trupulleikar á altjóða, politiska pallinum og havt brúk fyri onkrum góðum at heitt á, tí hetta eru menn, sum seta alheims politisku dagsskránna*



*Føroyski javnaðaformaðurin hitti eisini fyrrverandi uttanríkisráðharran, RobinCook, sum nú er formaður í tinginum. Tað hevur stóran týdning at samvinna við enskar politikarar, tí Bretland er hurðin út í Evropa og tað stóru verð, sigur Jóannes Eidesgaard*

### Íblástur til føroyskan politikk

Jóannes Eidesgaard sigur, at landsfundurin hjá Labour í Bretlandi vóru ógvuliga áhugaverdir dagar.

– Hetta var avgjørt nakað, sum kann geva íblástur til føroyskan politikk

–Tað er altíð ein fyrimunur, at sleppa uttanlands at fylgja við í, hvussu onnur arbeiða og loysa sínar trupulleikar. Hóast Bretland er eitt stórt land og Føroyar eru eitt lítið land, eru tey politisku virðini í nógvar mátar tey somu.

Jóannes Eidesgaard sigur, at føroyski javnaðarflokkurin fer nú at senda Labour innbjóðing at senda umboð til landsfundin hjá føroyska javnaðarflokkinum, sum verður í næsta mánað, so at teir eisini fáa høvi at kunna seg um tey mál, sum rørast í Føroyum og føroyska javnaðarflokkinum og har tað ber til at tosa meiri um samstarv ímillum londini.

Hann sigur, at tað er heldur ikki so undarligt, um hesir báðir flokkarnir hava samstarv, tí talan er um tveir sosialdemokratiskar flokkar, har politikkurin hvílir á samhaldsfesti og umsorgan fyri einstaka menniskjanum.

*Men nú sigur tú, at enski arbeiðaraflokkurin eisini vil hava tað privata vinnulívið at fíggja ein part av heilsuverkinum. Er tað so eisini eitt, vit kunnu vænta, at javnaðarflokkurin í Føroyum fer at arbeiða fyri?*

– Heilt avgjørt ikki. Ongin hevur sagt, at alt skal svølgjast rátt, men tað ber til at fáa íblástur burturúr tí, sum er at hoyra á einum slíkum fundi og tað er altíð hent at síggja, hvussu onnur loysa síni vandamál.

– Og tað skerst ikki burtur, at hetta eru politikarar við stórari ávirkan, so skulu vit hava eina hjálpandi hond at loysa føroyskar trupulleikar í altjóða høpi, kann tað vera hent at hava tætt samstarv við politikarar av slíkum kalibur sum teir í Labour, sigur Jóannes Eidesgaard.

Nógv at læra av skotum:

# Kunnu forða at Føroyar ikki minka meira

**Vinnunevndin, sum júst er afturkomin av ferð í Skotlandi, fekk sera nógv burtur úr. Formaðurin í nevndini fer nú til verka við m.a. tí í huga, at alt skal gerast fyri, at Føroyar ikki minka meira, og at ansast skal væl eftir, at ein oljuvinna ikki kollrennir samfelagið**

VINNUNEVND Á FERÐ
*Jan Müller*

-Boringin við markið í løtuni er sera avgerandi fyri oljutilgongdina við Føroyar. Gevur hon ikki nakað positivt úrslit, so er tað eitt afturstig fyri okkara virksemi. Oljufeløgini eru sera víða um í heiminum, har tey leita eftir tí bíligasta og besta sigur formaðurin í Vinnunevndini, Henrik Old júst heimafturkomin av kunningarferð í Skotlandi.

Undir vitjanini fingu tey innlit í m.a. hesa boringina, sum Amerda Hess stendur á odda fyri, men tey vitjaðu eisini hjá oljufelagnum Agip, sum skal bora næsta summar. Sjálvur heldur formaðurin í Vinnunevndini tað vera rætt av føroyingum at hyggja at, hvussu skotar hava ment hesa vinnu og eiga vit at læra av teirra mistøkum. Eisini eiga vit at læra av, hvussu teir hava fingið eyguni upp fyri at brúka pening og orku til at menna útjaðaraøkini í Skotlandi, sum í mongum førum eru meinlík útjaðaranum í Føroyum, har størsta armóðstekinið er ungdómurin, sum flytur burtur.

Henrik Old dylur ikki fyri, at nýggja Vinnunevndin hevur fingið ómetaliga nógv burtur hesi fyrstu ferðini í útlandinum. Hann heldur tað vera løgið, at vit ikki hava havt meira samstarv og samskifti við okkara næsta granna, sum vit jú hava so nógv felags við. Ikki minst rósar hann vanliga fólkinum har, sum er ótrúliga ærligt og vinarligt.

Við sær heimaftur hevur formaðurin í Vinnunevndini nógvan góðan førning, sum hann ætlar at brúka í sínum týdningarmikla arbeiði í Vinnunevndini. –Tað týdningarmesta eg fekk burtur úr var at kunna staðfesta, at man kann gera nakað fyri, at Føroyar ikki minka meira. Sjálvt um tað eru mong, sum halda, at man skal bara lata standa til og lata útviklingin koyra av sær sjálvum, so eri eg sannførdur um eftir henda túrin, at tað ber til at gera nakað fyri, at Føroyar ikki skulu minka meira enn tær hava gjørt. Og í sambandi við olju havi eg lært, at man skal fara heilt ómetaliga varisliga fram, so vit ikki kollrenna eitt lítið samfelag. Á ferðini fingu tey mong dømi um, at man krevur at ansa væl eftir. Lesið eisini samrøðu við formannin í Vinnunevndini í Sosialinum í næstu viku.



*Vinnunevndin á kunningarferð í Skotlandi. Her eru limirnir saman við umboðum fyri Oljumálaráðið og føroyskum umboðum í Bretlandi á fiskamarknaðinum í Peterhead.*

## Rætting

Vit skulu gera vart við, at feilur er í greinini um kommunulæknarnar í Klaksvík og í Vági, sum stóð í blaðnum í gjár. Av misgávum er brot úr eldri grein í Sosialinum komið við í greinina í gjár, sum annars skuldi enda mitt í fimtu spaltu (…sigur aðalstjórin í Trivnaðarmálaráðnum.). Alt tað, ið stendur eftir hetta, er brot úr gamlari grein, og átti tískil ikki at verið komið við í blaðið. Vit biðja vinarliga lesarar og Trivnaðarmálaráðið um at halda okkum til góða.

*jbh*